*Veljarakanning*

# Fullveldið á Alnetinum

**ATKVØÐIÐ**

**Skulu Føroyar loysa frá Danmark?**

| | |
|---|---|
| Ja | 49% |
| Nei | 49% |
| Veit ikki? | 2% |

**7080 atkvøður íalt.**

**| Útvega av QuickPoll |**
**|Aðrar atkvøður |**

Tað sum seinastu dagarnar hevur hugtikið nógv her á landi er, at nú ber til at atkvøða um loysing á alnótini. OK, ikki heilt. Atkvøðan er sjálvsagt bert vegleiðandi, og telur ongastaðni.

Men hvat skulu vit siga til hesa kanningina, er hon álítandi, og umboðar hon veruligu meiningina hjá fólkinum? Hetta kann sjálvsagt takast upp til viðgerðar, og ilt er at siga, um hesin hátturin umboðar nakað sum helst. Men tøkniliga er hetta ein sera hentur háttur at stinga fingurin í jørðina.

Vit hava hitt Ólavur Christiansen, hagfrøðing, á máli, og spurt hann um hvat hann heldur um eina slíka kanning. Fyri tað fyrsta, gav Ólavur okkum rætt í, at ikki ber til beinleiðis at avvísa úrslitið av eini slíkari kanning, men ein rúgva av spurnaðartekjum kunnu setast við kanningina. Eitt nú er tað veljarin ið vendir sær til heimasíðuna, og til ber at biðja onnur um at atkvøða.

Vit kunnu eisini ímynda okkum, at tað serliga eru tey yngru, og fólk sum starvast á skrivstovum, ið eru umboðað í hesi kanning. Hetta er eitt av spurnaðartekjunum, ið Ólavur Christiansen setir viðvíkjandi kanningini.

Ólavur Christiansen vísti eisini á, at fyri mongum árum síðan var ein veljarakanning í USA, meðan Roosewelt var forseti. Vanligt var tá, at bert tey ríku høvdu telefon, og tá so nevnda veljarakanning varð gjørd tilvildarliga gjøgnum telefon, vóru tað bert tey ríku, ið svaraðu, og hetta viðførdi, at kanningin var so dyggiliga skeiv.

Stutt áðrenn okkara dead line, vóru tað yvir sjey túsund fólk, ið høvdu atkvøtt, og støðan var tá, at 49% vildu loysa frá Danmarki, 49% vóru ímóti loysing, meðan 2% ikki vistu um tey vilja hava fullveldi.

Um úrslitið er gott ella ikki, hevur K.T.Hornið sjálvsagt onga meining um, men tøkniliga er hetta ivaleyst enn eitt boost fyri KT økið sum heild.

Skrivað:
Finn Jensen
**finn@sosialurin.fo**

## Ger tína egnu kanning

Til ber nú at gera eina og hvørja kanning á egnari heimasíðu. Hetta er eitt sera hent amboð í vinnuni, og sjálvsagt eisini á politiska økinum.

Við at venda tær til Quick Poll, ið finst á www.quickpoll.dk, kann hetta fáast í lag, og tað er heilt ókeypis.

Tað er KT fyritøkan *LavaSoft — Advanced Internet Solutionsk*, ið stendur fyri hesum.

## Káta hornið

Fyri at fáa Windows 95 at rigga, má ein hava styrkina hjá einum P5, 16 MB ram og 1 GB harddisk. Fyri at senda fyrsta mannin á mánan, var ein telda nýtt, ið hevði styrkina hjá einum Commodore 64. So okkurt má vera rav ruskandi galið, og tað var ikki Apollo.
**Citat frá internetinum**

Internetið er sum ein neutron bumba. Ein rúgva av bygnaði, men ongi fólk.
**Citat frá internetinum**

Um talan var um eina kunningartøkniliga koll-velting, er hon av. Kunningartøknin vann.
**Diana Lady Dougan**

# KT-Depilin

***Heimasíðu ummæli***

*Vit síggjast í morgin, vit síggjast til fótbólt, ella vit síggjast í skúlanum í morgin.*

Nakað soleiðis eru vit von við at hoyra tey ungu málbera seg, í øllum førum fyri nøkrum árum síðan. Men soleiðis er ikki longur. Sjálvsagt síggjast tey ungu framvegis í skúlanum, til fótbólt ella onnur støð har tey eru von at møtast.

Nú á døgum kunnu vit ímynda okkum, at tey ungu í staðin siga:

*Vit hoyrast, eg sendið tær eini SMS boð, vit prátast við á netinum, ella vit hittast á KT-Deplinum.*

KT-Depilin er fyrst og fremst tøkniliga møtingarhølið hjá teimum ungu, har tey kunnu práta saman, ella *chatta* sum tað nú kallast.

Ongin ivi er um, at tey ungu ikki síggja somu vansar við KT-tøkniligu menningini, sum tey tilkomnu gera tað. Eitt nú halda tey ungu, at tað er í fínasta lagi, at møtast á internetinum í staðin fyri at vitja hvønn annan. Tað tykist tó heldur ikki at vera nakar vandi á ferð, tí tey ungu møtast og skiljast fysiskt hóast alt hvønn einasta dag. KT-Depilin er bert ein møguleiki afturat, at koma í samband við hvønn annan, og onnur sum ikki eru á sama geografiska øki.

So summa sumarum, mugu vit siga, at hetta er einans ein hentleiki, so leingi tey ungu framvegis noyðast at møta upp í skúlanum, til fótbólt o.s.fr. Hvussu leingi hetta kemur at halda, tí internet undirvísing er við at gera um seg í londunum kring okkum.

Um vit líta at heimasíðuni



hjá KT-Deplinum, ið er at finna á slóðini www.skulin.fo, er talan um rímiliga *fancy layout* um vit skulu nýta nýmótans orð.

Tað sum KT-Depilin sjálvsagt er blivin kendur fyri, er at allir skúlanæmingar í Føroyum hava fingið eina e-mail adressu gjøgnum hesa heimasíðu. Hetta hevur so viðført, at webstaðið er blivið eitt forum fyri skúlanæmingarnar.

Eitt sum kanska manglar við hesi heimasíðu er, at tað ikki beinleiðis finnst ein tjaksíða, har tey ungu kunnu práta um meiningar og áhugamál. Eitt nú hevði verið sera spennandi, um skúlanæmingarnir hendan vegin kundu sagt sína hugsan um støðuna, nú próvtøkur teirra av álvara eru í vanda vegna verkfallið, ið lærarnir eru farnir í gongd við. Hetta kundi eisini verið ein íblástur til tíðindaflutningin, við tað at tey ungu ikki altíð vera hoyrd gjøgnum teir meira konventionella fjølmiðlarnar.

Eitt annað sum manglar, er beinleiðis tíðindaflutningur fyri yngri fólk, eitt nú innan tøkni og møguliga eisini teirra egnu áhugamál. Talan kundi verið um undirhald av ymsum slagi, t.d. tónleikur, ítróttur ella okkurt annað, ið hevur teirra áhuga.

Fyri at taka tað meira positivu síðuna við, so hevur hendan síðan eina góða flatu út á netið, har møguligt er hjá skúlanæmingunum at byrja við KT-Deplinum, og aftaná at hava tømt postboksina, og gjørt dagsins postalu ørindi, kunnu tey fara víðari út á netið.

Eitt sum telur upp eftir er, at heimasíðan hevur sína egnu post-skipan, ið er eitt gott alternativ til útlendsku hotmail og betalings postboksirnar hjá Føroya Tele.

Eitt sum telir niður er sjálvsagt, at síðan alt ov ofta er óvirkin. Í skrivandi løtu, fæst ikki samband við heimasíðuna, og hetta er ov vánaligt.Við øllum í huga, vilja skotsmál okkara til www.skulin.fo verða:

**Ummæli av www. skulin.fo:**

| | |
|---|---|
| Tøknikkur: | **** |
| Stílur/snið: | *** |
| Hentleikar: | **** |
| Møguleikar: | **** |
| Lætt at nýta: | *** |
| Skjótleiki: | *** |
| **Samanlagt**: | ***(*) |

Skrivað: Finn Jensen
**finn@sosialurin.fo**

# Smátíðindi

**Fløgusáttmála uppá 250.000 US$ við MP3-fílu**
Fyrrverðandi keyboard-spælarin í bólkinum Talking Heads, Jerry Harrison hevur gjørt ein ultimativan e-handil fyri kjallaratónleikabólkar, sum droyma um ein fløgusáttmála.
Garageband.com eitur nýggi handilin á internetinum. Talan er um eina roynd at koma í samband við tónleikabólkar um allan heim, sum droyma um ein góðan fløgusáttmála. Tónleikabólkarnir kunnu sjálvir leggja sína MP3 fílu inn á heimasíðuna. Fyri at gera tað heila meira áhugavert, verður ein bólkur valdur hvønn mánaða, sum fær ein fløgusáttmála uppá 250.000 US$. Tað eru vitjandi á heimasíðuni sum, við at atkvøða, avgerða hvør vinnur. Fyrsti vinnarin bleiv bólkurin Boondogs sum er úr Little Rock í Arkansas í USA. Amerikanska blaðið Wired sigur frá Jerry Harrison at tey vænta at koma at síggja nógvar nýggjar bólkur, sum koma frá nógvum fjarskotnum støðum.
Her kann veruliga sigast at føroyskir bólkar hava ein góðan møguleika.

**ORÐALISTI**
Orð ið eru nýtt í K.T.Horninum í dag og frammeftir:

| | |
|---|---|
| **Evnisyvirlit** | Emneregister |
| **Fílaflutningur/fílaveiting** | Filoverførsel |
| **Heimsnet** | World Wide Web |
| **Heimstaður/heimaøki** | Domæne |
| **Ímynd** | Ikon |
| **Kervi** | Netværk |
| **Kjaksíður** | Diskussionsgrupper |
| **Leitibúnaður** | Browser |
| **Leitimaskina/Netleitari** | Søgemaskine |
| **Ravtøkni** | Elektronikkur |
| **Ritbúnaður** | Software |
| **Tíðindasíður** | Nyhedsgrupper |
| **Tólbúnaður** | Hardware |
| **Uppstiging** | Opgradering |

sam~teld

## Topp-10 listin

**Mest vitjaðu føroysku heimasíðurnar**

| Hesa vikuna | Síðstu viku | Vikur á listanum | Síðunavn |
|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 5 | Faroese Chat |
| 2 | 3 | 11 | Tíðindablaðið Sosialurin |
| 3 | 8 | 9 | Jógvan Heinesen |
| 4 | 4 | 11 | Dimmalætting |
| 5 | 1 | 4 | Magnus Sørensen |
| 6 | 7 | 4 | Leitel Tíðindi |
| 7 | 5 | 9 | Leitel Chat |
| 8 | 9 | 4 | NSÍ |
| 9 | Nýggj | 0 | KÍ - Klaksv. Ítróttarfelag |
| 10 | Nýggj | 0 | B36 |

Kelda: *www.leitel.fo*







Brynjálvur, Ólavur og Thom í stýrhúsinum á Roða.



Tað kann vera sera vandamikið at arbeiða sum skrellimaður. Tað kemur javnan fyri at brotið glas og knívar verða koyrd í sekkirnar.

# av lorti

»Tey siga, at eingin er deyður av lorti. Eg livi bókstaviliga av honum«
Ólavur Johannesen

tær sjálvum. Hetta er sjálvstøðugt arbeiði«.

**Skrald-Thom og Ren.ped**
Sunnanfyri Sjómansheimið halda skrellimennirnir ein lítlan steðg. Meðan teir sløkkja tostan við hvør sínari Jolly Cola viðgerða teir samráðingarferðina hjá landsstýrinum í Keypmannahavn. Á sín heilt sermerkta hátt.

»Fyrst blivu teir óðir, so blivu teir flóvir«, sigur hittinorðaði Ólavur.

»Christiansborg?« tekur Brynjálvur undir »Vit kundu tað sama koyrt teir í skrell, alt landsstýrið sum tað er«.

»Verður loysing verða posarnir tómir« leggur Thom uppí. »Livistøðið verður so lágt, at vit fáa einki arbeiði«. Og nú kemur látur í.

»Ja, fáa vit fullveldi verður bert ein maður eftir her hjá okkum. Alt verður so skralltómt, og tí verður bara Skrald-Thom eftir«, skýtur Brynjálvur aftur.

Tónin er beinleiðis og vinsamur.

Tá ið vit spyrja hvat vit skulu kalla yrkið hjá teimum trimum – renovatiónsmaður, ruskmaður ella skrellimaður, er Brynjálvur kvikur at svara: »Renovatiónspedagokur!«

»Ren.ped.«, sigur Ólavur og stavar tað fyri okkum. »Akkurát sum cand. mag og cand.ped. Eg havi mangan hugsað um at sett tað í telefonbókina, men eg tori ikki. Nei, sig skrellimaður. Ikki renovatiónsarbeiðari. Skrellimaður situr nógv betri«.

**Lívsins umstøður**
Tá ið klokkan nærkast eitt rullar IRF-bilurin Roði umborð á Ternuna, á tremur við húsarhaldsruski úr Klaksvík. Teir tríggir skrellimennirnir skiftast um, at koyra hann til Lorvíkar og hesa vikuna eigur Ólavur tørn. Hálvvaksni sonur Ólav, Martin, situr eisini í stýrhúsinum.

Hjá Ólavi vóru tað lívsins umstøður sum gjørdu, at hann bleiv skrellimaður.

»Tað komst av tí, at vit fingu ein son sum er spastikari. Eg var sjómaður, men valdi at vera heima. Eg havi ongantíð havt nakran dreym um, at eg skuldi blíva skrellimaður. Eg vaknaði ikki fyrr enn eg kom til arbeiðis, og tá fann eg út av hvussu gott hetta arbeiði var. Áðrenn hevði eg ongar tankar gjørt mær um, hvussu tað mundi vera at fara í skrell«, sigur Ólavur, sum heldur, at størsti fyrimunurin við arbeiðnum er frælsið og frítíðin:

»Vit fáa fasta løn og royna at arbeiða so skjótt sum tilber. Tað er gularótin hjá okkum. Tess skjótari vit bera at, tess skjótari fáa vit frí, og so fært tú tíð at røkja tíni frítíðaráhugamál, sigur Ólavur.

Tá klokkan nærkast tvey koyrir Roði inn á brennistøðini hjá IRF á Hagaleiti, har lastin verður tømd.

»Tað tekur tað mesta av einum degi at fylla bilin, og bert ein minutt at tøma hann aftur«, sigur Ólavur, tá ið teir umleið 700 skrelliposarnir við eini 15 tonsum av húsarhaldsrusi úr Klaksvík fara skramblandi niður í slokuna.

## Hvat merkir skrellimaður?

Danir eru undangongumenn, tá ið talan er um ruskinnsavning. Innsavningin í Danmørk í farnu øld var skipað soleiðis, at ruskmenninir komu út á gøturnar og gjørdu vart við seg við sonevndum *skrallum* (á føroyskum: Skreljum).

Tá ið teir vundu skreljurnar, og tað gelti í í donsku túnunum, vistu fólk, at nú var tíðin komin at fara út í tún við ruskinum. Eftir stuttari tíð vórðu menninir nevndir *skraldemænd*, tí sovorðin gangur var av skreljunum. Upp aftur seinni varð ruskið nevnt *skrald*. Føroyingar tóku seinni orðini til sín, og nevndi ruskmenninar *skrellimenn* og ruskið *skrell*.